## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Vindurin veksur av útsynningi, 5 til 10 m/s. Tað verður skýggjað fyri tað mesta, men turt. Hitin millum 8 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin**
Frískur vindur av útsynningi, 10 m/s, yvirskýggjað og regn vestaneftir. Um náttina mest turt og vestanvindur. Hitin millum 10 og 13 stig.

# Finala




Drotningarvitjanin er av og Høgni fekk sína ríkiligu fjølmiðlakvotu, sum hann ikki kann vera fyriuttan

Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281

Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu

Nýggir kjólar kunnu útvegast

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

5 707265 100067 >



Almannastovan søkir sosialráðgevarar.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Høvuðsuppgávan hjá økisdeildunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.

Á Norðoya deild í Klaksvík eru 5 starvsfólk, og á Eysturoyar deild í Runavík 7 starvsfólk.

Á deildum Almannastovunnar í Klaksvík og í Runavík eru tvey fulltíðarstørv sum sosialráðgevi leys at søkja. Starvið í Runavík er eitt avloysarastarv fyri sosialráðgeva í farloyvi til 1. mai 2006.

Tey, ið verða sett í hesi størv, verða partar av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingunum í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

Størvini umfata í høvuðsheitum ráðgeving og vegleiðing av borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar, íverksetan av fyriskipanum, gerð av tilráðingum í sambandi við umsóknir um fyritíðarpensjónir og annað.

Vit sóknast eftir fólki við sosialráðgevaraútbúgving. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan almenna fyrisiting, góðan telduførleika á brúkarastøði, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6.

Nærri upplýsingar um starvið á Norðoya deild fáast við at venda sær til Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, deildarleiðara, á telefon 457240.

Nærri upplýsingar um starvið á Eysturoyar deild fáast við at venda sær til Egil G. Olsen, deildarleiðara, á telefon 474710.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 8. juli 2005.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 44 93 39